gult cyan magenta svart

Eg elski bøkur

BØKUR Nú á døgum ver›ur ofta sagt, at føroyingar geva bara bøkur út til jóla. - Ein kanning vit hava gjørt vísir, at rætt er, at nógv tær flestu føroysku bøkurnar ver›a útgivnar seinasta ársfjór›ingin í árinum, sigur Martin Næs landsbókavør›ur, sum undir heitinum "Bókatal og bókasvøvn" helt fyrilestur í sambandi vi› tiltaki› "Bókin ár 2000"

Martin Næs

Ta› ári› tá i› Leo Tolstoj var› føddur í Russlandi — í 1828 — , tóku menn í Føroyum, saman vi› ø›r-um gó›um fólki, á seg at skipa fyri bókasavnsvirk-semi her í b‡num. — Tá bú›u uml. 6.200 fólk í øll-um Føroyum, og tá vóru ikki meira enn einar 2 bøkur skriva›ar og útgivnar á okkara egna máli.

5. november 1910 — á 82 ára stovningardegnum hjá hesum stovni, tit í dag hava leita› tykkum inn í — tá doy›i Leo Tolstoj. Um hetta mundi› búleik-a›ust uml. 15-20.000 fólk í Føroyum, og bøkurnar sum tá vóru komnar upp á prent á føroyskum hava veri› uml. 60 tilsamans. Eitt nú høvdu vit í 1908 fingi› eina føroyska mál-læru útgivna, og tann fyrsta føroyska skaldsøgan hev›i eisini sæ› dagsins ljós í 1909. So sigast kann, at lunnarnir vór›u lagdir.

Bókatal

Í einum yvirliti yvir før-oyska bókaútgávu sum landsbókasavni› hevur lati› gjørt, og sum seinast er almannakunngjørt í seinastu ársfrágrei›ing okkara sæst, hvussu føroysk bókaútgáva veksur upp gjøgnu m alla øldina. Ni›anfyri sæst, hvussu nógvar bøkur á føroyskum eru útgivnar nevndu tí›arskei›:

1822-1899	22
1900-1939	197
1940-1949	124
1950-1959	173
1960-1969	274
1970-1979	686
1980-1989	1.074
1990-1999	1.332

Bera vit tey fyrstu 40 árini av øldini saman vi› tey sí›stu 10, so síggja vit, at gró›ur hevur veri› í bókaútgávuni, tí í tí›ar-skei›num 1900 til 1939 vór›u útgivnar 197 bøkur í alt, me›an tí›arskei›i› 1990-1999 vóru í me›al útgivnar 133 bøkur um ári›.

Nú á døgum ver›ur ofta sagt, og ta› av røttum, at føroyingar geva bara bøkur út til jóla. Ein kanning vit hava gjørt vísir, at rætt er, at nógv tær flestu føroysku bøkurnar ver›a útgivnar seinasta ársfjór›ingin í ári-num. Í 1991 vóru t.d. um-lei› 2/3 av øllum bókaút-gávum útgivnar í novem-ber-desember. Hetta broyt-ist eitt sindur frá ári til ár, men er ivaleyst ein røtt mynd av útgávunum.

Fyri at vísa á at bøkur eisini ver›a útgivnar a›rar tí›ir í árinum, hava vit talt upp, hvussu útgávurnar higartil í ár, ár 2000, hava laga› seg, og myndin sær solei›is út:

17 Fagurbókmentir
21 Yrkisbókmentir
16 Barna- og ungdómsbøkur
16 Skúla- og lærubøkur

Í alt higartil í ár eru sostatt 70 bøkur útkomnar, men sum kunnugt, ári› er ikki av enn. So ta› er okkurt, sum t‡›ir uppá, at vit lætt-liga fara at koma upp á tær 118 bøkurnar, sum íresta, so at samla›a føroyska bókatali› rundar tey 4000, á›renn ár 2000 er fari› í søguna.

Hesar 70 bøkurnar eru altso útgivnar í tí›arskei›-num januar-september í ár, tvs. á›renn tann sokalla›i jólabókamarkna›urin hev-ur fingi› fótin fyri seg. Eitt, sum eg haldi vera áhugavert vi› hesum út-gávunum er, hyggja vit at fagurbókmentunum, so sæst, at hesar — longu í ár - eru 17 í tali. Prosabøkur-nar eru 9, allar t‡›ingar og allar eru tær útgivnar á einum og sama forlagi — Sprotanum. Yrkingasøvni-ni eru 8 í tali, til saman-bur›ar vi› prosaverkini kann sigast um tey, at tey eru øll upprunaverk, og haraftrat øll útgivin á hvør sínum forlagi.

Um tær 16 barnabøkur-nar er at siga, at hesar eru allar t‡ddar, og Føroya Lærarafelag hevur givi› tær allar út. — Skulu vit útnevna ein serligan bólk av bókum, sum tykist ver›a goymdur til at koma undir jólatræi›, so má ta› ver›a føroyskar uppruna prosabøkur — bæ›i til børn og vaksin. Tí higartil í ár telur bólkurin 25 bøk-ur — og tær eru allar t‡›-ingar!

Um skúla- og lærubøk-urnar er ta› at siga, at ta› sæst t‡›iliga at Føroya Skúlabókagrunnur, sum stendur fyri teimum all-arflestu útgávunum av hes-um slagnum, ikki hevur "s-eson" á jólum, men at tey á grunninum mi›a eftir at fáa bøkurnar út til skúla-ársbyrjan, tvs. um summ-ari› og fram á heysti›. Annars haldi eg, at Skúla-bókagrunnurin hevur hig-artil í ár sta›i› fyri trimum avbera vøkrum og væl úr hondum greiddum verk-um: bókini um føroysku FLORUNA, bókini um HAVI‹ og úrvalssavninum STJØRNUSKALDI‹ UNDIR VAR‹A. Tríggjar bøkur, i› á ongan hátt standa aftanfyri líknandi bøkur útgivnar í ø›rum londum.

Men 70 bøkur higartil í ár — er ta› ikki ein broyt-ing?

Jú, ta› meta vit. Kanska er ta› tí, at hetta er eitt ser-ligt ár. Fólk eru ikki á ein-um máli um, um hetta er byrjanin ella endin. Um man er fyrstur ella sí›stur. Eg hugsi um øldina. - Ári› byrja›i í hvussu er vi› stórum bókmentafagna›i í sambandi vi› at 100 ár vóru li›in, sí›an William Heinesen var› borin í heim. Í hesum sambandi vóru fleiri bøkur givnar út í januar mána›i, nógv fleiri enn ta› vanliga plag-ar, og kanska av somu orsøk vóru færri givnar út í desember í fjør?! ta› er ilt at vita. Í hesum sam-bandi er vert at leggja sær í geyma, at í ársins sí›sta mána›i ver›ur aftur bók-mentafagna›ur í sambandi vi› at 100 ár tá eru li›in sí›an teir bá›ir Chr. Matr-as og Jørgen Frantz Jacobsen vór›u bornir í heim. Og uttan iva koma eisini bøkur út í tí sam-bandi.

Eg hugsi, at ta›, at Barn-abókaklubbin hjá Lærara-felagnum, Bókaklubbin hjá Sprotanum og virksemi› hjá Føroya Skúlabóka-grunni arbei›a meira og meira undir skipa›um vi›-urskiftum, ger at føroysk bókaútgáva ver›ur meira og meira spjødd um alt ári›, og eg haldi, at hetta er ikki bara gott fyri pengapungin hjá tí ein-staka keyparanum, men hetta er eisini gott fyri bókina sjálva, tí á henda hátt hava fleiri bøkur møg-uleikan at daga undan í rúgvuni.

Mangan ver›ur spurt, hvussu landsbókasavni› ger upp føroyska bóka-útgávu. Til hetta er stutt at siga, at vit hava f‡ra høv-u›skeldur, at halda okkum til:

1. løgtingslógina frá 1952 um landsbókasavni›, sum m.a. sigur, at lands-bókasavni› skal skráseta alt prenta› føroyskt tilfar, tilfar um Føroyar og tilfar, sum er skriva› av føroy-ingum

2. løgtingskunnger› frá 1952 um av-hendingar-skyldu av prenta›um tilfari aftrat hesum greinum í løgfrø›ini, hava vit eisini onnur ‘hjálpitól’ at halda okkum til, eitt nú:

3. hald frá bókahandli upp á alt føroyskt tilfar, tilfar um Føroyar ella tilfar, sum er skriva› av føroyingum. Hetta er tilfar, sum ver›ur keypt.

4. gávur frá forløgum og høvundum. Ta› er ikki so líti›, sum landsbókasavni›, millum ár og dag fær sum gávu frá einstaklingum, forløgum og feløgum. Tal-an er bæ›i um spildurn‡tt tilfar, og um eldri tilfar. Hetta eru vit sjálvandi ómetaliga takksom fyri.

Hetta ger ikki bara stovnin til eitt betri bókasavn, men alt hetta ger eisini, at vit eru enn betri før fyri at koma vi› so røttum hag-tølum sum gjørligt um før-oyska bókaútgávu.

Samanlagt er ta› vi› hesum ambo›um, at vit royna at halda st‡r á uppteljingini.Sjálvandi kann ta› koma fyri, at talt ver›ur skeivt, og orsøkin til hetta kann skyldast fleiri orsøkum. Undirstrik-ast skal her, at tá i› sagt ver›ur "bøkur á føroysk-um", so ver›ur sipa› til bøkur, skriva›ar og útgivn-ar á føroyskum — og einki anna›. Einum røttum bók-asavni líkt, so ver›ur sjálv-andi alt anna› eisini talt upp, men ta› fer í a›rar bólkar. Her kann eg nevna: árbøkur, tí›arrit, og bøkur á ø›rum málum um før-oysk vi›urskifti osfr. Hetta ver›ur alt sjálvandi talt upp, men ikki í bólkinum "bøkur á føroyskum".

Bókasøvn

Í yvirskiriftini stendur, at eg skal eisini tosa um bókasøvn. Onkur heldur kanska, at ta› átti at veri› óney›ugt, tí Martin fær ikki lati› munnin upp uttan eisini at tosa um bókasøvn. Eg skal tí ikki troytta tykkum so nógv vi› hesum beint nú, men havi hug at vísa á eitt álit, sum ein arbei›sbólkur undir Undirvísingar- og Menta-málast‡rinum hevur lati› st‡rinum fyri trimum vik-um sí›an. Áliti› eitur "Bókasavnsvi›urskiftini á vinnu- og mi›námsskúlu-num". Hetta er ein gjøgn-umgongd av stø›uni á bókasavnsøkinum á okkara vinnu- og mi›námsskúl-um. Í veruleikanum kemur áliti› inn á allan bóka-savnspolitikkin í landinum. Um bókasavnstænastuna ver›ur m.a. sagt:

"Í dag er bókasavnstæn-asta so nógv meira enn bara bøkur. Og skúla-bókasavnstænasta ikki um at tala. Her koma serliga inn í myndina n‡ggir und-irvísingarhættir vi› n‡gg-jum undirvísingarambo›-um. Hetta hevur vi› sær, at heilt onnur krøv ver›a sett, ikki bara til ta› innihalds-liga í einum skúla-bókasavni, men eisini til teir fysisku karmarnar í einum nútímans bóka-savni, enn gjørt var› bara fyri nøkrum heilt fáum ár-um sí›an.

Tá i› tosa› ver›ur um tí›arhóskandi bókasøvn í dag, ver›ur ikki bara hugs-a› um atgeingi til bøkur og møguleikan at læna tær. Elektronisku leitimøgu-leikarnir gera, at tú sum lánari hevur nógv lættari og betri atgongd til skrásett tilfar sum t.d. tí›-arrit, fløgur, filmar og tón-leik. Harumframt er inter-netatgongd ein natúrligur partur av innihaldinum á bókasøvnunum. V.ø.o. skal eisini hugsast um teir fys-isku karmarnar, tí nú eru ikki bara hillar, bor› og stólar at hugsa um. Hugs-ast má eisini um at útvega lánarunum/brúkarunum a›rar arbei›sumstø›ur enn tær vanligu, so at teir fáa veruligt gagn av teimum tilbo›um, bókasøvnini kunnu veita.

Tí›in er vissuliga runnin frá tí hugbur›i, at bóka-savni› kann liggja uppi í einum avlopsrúmi úti undir va›ingini, ni›ri í kjallar-anum ímillum kustar og spannir, ella saman vi› serundirvísingini inni í teirri gomlu skúlastovuni."

Og broti› um bóka-savnstænastuna endar so-lei›is:

"Nú føroyska samfelag-i›, sum ta› er at fegnast um, hevur sett sær fyri at veita vinnu- og mi›náms-skúlunum eina líkinda bókasavnstænastu, mugu vit sta›festa, at vit mugu taka anna› skinn um bak, skulu vit nøkta tann bók-asavnstørv, hesar útbúgv-ingar krevja." (s.7)

Ta› er at vóna, at tá i› Undirvísingar- og mentamálast‡ri› hevur lisi› hetta áliti›, tá fer hetta at merkjast upp í-gjøgnum alt systemi›, eg sigi vi› vilja upp ígjøgnum alt systemi›, - tí teir 14 vinnu- og mi›náms-skúlarnir í landinum standa so púra á berum, tá i› ta› sn‡r seg um tí›ar-hóskandi bókasavnstæn-astu.

Um stø›una í dag, og kanska serliga um framtí›-ina á bókasavnsøkinum, kann eg siga, at vaksandi áhugin hjá almenninginum fyri bókasavnsvirksemi-num, tær spakuliga hækk-andi játtaninar á løgtings-fíggjarlógini og ta›, at fleiri og fleiri ung hesi seinastu árini hava sett sær fyri at fáa sær útbúgving innan hetta yrki›, sigur mær, at samanlagt hava vit okkurt gott í væntu.

Til teirra, i› vilja vita meira um, hvat fari› er fram á bókasavnsøkinum í Føroyum sí›an hitt tiltikna ári›, tá i› Leo Tolstoj var› borin í heim í Russlandi, kann eg bara leggja aftrat: hyggi› inn á heimasí›ur-nar hjá Landsbókasavni-num www.flb.fo og hjá B‡arbókasavninum www.byarbok.fo — tær eru seinast dagførdar fyri fáum døgum sí›an. Geri› so væl!

Ein ungur William Heinesen lesur í stóru bókini…

eg elski bøkur

sum málningar og litir or›ini tey koma
mó›irleysar stavir í fostur eg tók
bókin er gandur sum tí›ina fjalir
hugflog títt mennist vi› at kaga í bók

bókin er og ver›ur tín vinur
bókin er sum leskandi løkur
so satt sum ta› er sagt
jú, eg teski ta›, eg teski
at eg elski bøkur

vist var lívi› fátækt, var her eingin pennur
okkum or› og bøkur ella kvæ›i gav
jú, vist var lívi› syrgiligt var her bara sjónvarp
sigling um andans ví›a úthav

bókin er og ver›ur tín vinur
bókin er sum leskandi løkur
so satt sum ta› er sagt
jú, eg teski ta›, eg teski
at eg elski bøkur

Av fløguni:
Bubbi "allar áttir"
Skífan 1996
Martin Næs t‡ddi
23/9-2000

Martin Næs f. 1953 er útbúgvin bókavør›ur á Danmarks Biblio-teksskole 1978. Eftir at hava veri› bóka-vør›ur 1978-81 á Lands- og B‡arbóka-savninum, gjørdist han 1. bókavør›ur á Landsbókasavninum. Í 1983 fór til Íslands, har hann í tvey ár var bókavør›ur í Akur-eyri. Í 1985 var› hann settur landsbókavør›-ur í Føroyum, har hann hevur starvast í føstum starvi sí›ani 1989. Martin Næs hevur givi› út 3 yrk-ingasvn, hitt fyrsta í 1972, hevur givi› út 4 barnabøkur og eina skaldsøgu "Tvey" í 1990. Í 1995 gav hann út greinasavni› "Hvør eigur flagg-knappin?". Martin Næs hevur t‡tt hópin av bókum og fekk í 1981 Barnabókahei›-ursløn Tórshavnar B‡rá›s og í 1995 Bókmentavir›isløn M. A. Jacobsens fyri yrkisbókmentir. Mart-in Næs hevur veri› forma›ur í Rithøv-undafelag Føroya og í Or›abókagrunni Fró›skaparfelags Før-oya og st‡rislimur fyri Nor›urlandahúsi› í Føroyum.